# Gerðabók í sambandi við býráðsfund

**Dagfesting:** 26.04.2021 kl. 19:00
**Málnr.:** 21/00071-4

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Ólavur Larsen, Magni Jøkladal, Eivin Breiðaskarð og Gudny Vang

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| 12/21 | 21/00096-3 | Skótarnir - Umsókn um fíggjarligan stuðul<br>Arkivmál 19/00377 |
| 13/21 | 21/00201-6 | Uppskot til reglugerð fyri Fuglafjarðar sløkkilið |
| 14/21 | 21/00239-2 | Útstykkingarætlan millum Gjógvará og vegin vestur á Horn |
| 15/21 | 21/00240-3 | Meka_Nýggj el-innllegging |
| 16/21 | 21/00268-1 | Fuglafjarðar bókasavn - Fíggjarætlan 2022 |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

12/21

**21/00096-3 Skótarnir - Umsókn um fíggjarligan stuðul**
**Arkivmál 19/00377**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.03.2021 | 8/21 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.04.2021 | 12/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 17/21 |
| 4 Býráðið | 26.04.2021 | 12/21 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Mentanarnevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing | Skótaliðið verður 60 ár í 2021 Gullbrandur er stovnað 9. feb 1961 og Erla Kongsdóttir 8. sept 1961. Ætlanin er at halda dagin seinri í heyst.Til dagin er ynskiligt at skótahúsið verður fríðkað.<br>Í stuttum verður sókt um stuðul á 375.000 kr til fylgjandi arbeiðir<br>• Skifta tekju<br>• Mála húsið<br>• Fríðka økið uttanfyri<br>• Renovera trappuna<br><br>Ískoyti til málslýsing: EáL og eg sjálv høvdu fund við Bárð Petersen fyri skótarnar tann 25. Apríl. Bárður varð kunnaður um at mentanarnevndin er posetiv, men at málið mátti fyri nevnd aftur og síðani í fíggjarnevnd. BP kunnaði um at tá svar fyriliggur frá nevndini, verður umsókn send til fyritøkur um møguligan stuðul til verkætlanina. BP hevði havt ráðgeva innyvir til prísáseting av arbeiðinum sum skal gerast. Alt eftir upphædd, má málið fyri fíggjarnevnd í komandi viku.<br><br>**Framhald 13. apríl 2021**<br>Mentamálanevndin hevur á fundi tann 9. apríl í ár tikið avgerð um, at mæla til at stuðla verkætlanini við 30 tús. kr. av rakstrarstaði 550, men harumframt, um tað er møguligt, at stuðla skótaliðnum við 150 tús. kr.<br><br>**Framhald 22. apríl 2021**<br>Fíggjarnevndin samtykti á fundi í dag, at biðja býráðið um eina eykajáttan á 150 tús. kr. sum stuðul til skótaliðið, í høvuðsheitum við ti endamáli, at leggja nýtt tak á skótahúsið. Ein møgulig eykajáttan, sum sambært § 41, stk. 2 í kommunustýrislógini skal hava tvær viðgerðir í |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, kann í hesum førinum fíggjast av gjaldførinum hjá kommununi. | | |
| Bakgrund | Umsókn um stuðul til skótahúsið | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>• Stuðulspolitikkur | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Mælt verður til at veita 1/3 av verkætlanarupphæddini | | |
| Dagf | 10.03.2021 | | |

Mentamálanevndin 12. marts 2021:
Nevndin er posetiv um at stuðla Skótunum við at fáa húsið fríðkað. Men málið má í fíggjarnevnd fyri at finna stuðulin. EJ heldur tað vera týdningarmikið at vísa at kommunan hjálpur til, men tað er umráðandi at skótarnir sjálvir, lyfta uppgávuna. GV heldur ikki at umsóknin vísur intiativ til sjálvboðið arbeið.
Nevndin tekur fund við Skótarnar.



**Mentamálanevndin 09. april 2021:**
Tað er ein samd nevnd sum mælir til at FK veitir ein stuðul á 150.000 kr og leggur nevndin hervið málið fyri fíggjarnevndina við áheitan um at taka málið upp á fyrstkomandi fíggjarfundi. Mentamálanevndin kann lata 30.000 kr til samlaðu upphæddina, av rakstrarstað 550.

**Fíggjarnevndin 22. april 2021:**
Fíggjarnevndin samtykti, at mæla býráðnum til at fylgja tilmælinum frá mentamálanevndini, og biðja býráðið um eina eykajáttan á kr. 150 tús. kr. sum stuðul hjá skótaliðnum til serliga at leggja nýtt tak á skótahúsið.

**Býráðið 26. april 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at taka undir við tilmæli frá mentamálanevndin og fíggjarnevndini og við 1. viðgerð játta eina eykajáttan á 150 tús. kr. sum stuðul til skótaliðið til serliga at leggja nýtt tak á húsið.

4

## 13/21
## 21/00201-6 Uppskot til reglugerð fyri Fuglafjarðar sløkkilið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 26.04.2021 | 13/21 |

### Tilráðing

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
| Stutt lýsing | Tilbúgvingarleiðarin hevur í samráði við kommunustjóran gjørt uppskot til reglugerð fyri sløkkiliðið, sum varð viðgjørt á fundi í tilbúgvingarnevndini tann 23. mars í ár.<br><br>Uppskotið ásetir nøkur formlig, praktisk og virðis-viðurskifti rundanum virksemi hjá sløkkiliðnum. | | |
| Bakgrund | Áheitan frá tilbúgvingarleiðaranum um at fáa gjørt eina reglugerð. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Kommunustýrislógin**<br>**Tilbúgvingarlógin**<br>**Tilbúgvingarætlan fyri Fuglafjarðar kommunu**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Uppskot til reglugerð fyri Fuglafjarðar sløkkilið, dagfest 23. mars 2021** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Møguliga |
| | Umsitingarligar | Nei | Møguliga |
| Tilmæli | Mælt verður til, at býráðið góðkennir fyriliggjandi uppskot til reglugerð fyri Fuglafjarðar sløkkilið. | | |
| Dagf | 21. apríl 2021 | | |

5

**Býráðið 26. april 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at góðkenna relgugerðina fyri Fuglafjarðar sløkkilið.

## 14/21
## 21/00239-2 Útstykkingarætlan millum Gjógvará og vegin vestur á Horn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 15.04.2021 | 29/21 |
| 2 Býráðið | 26.04.2021 | 14/21 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Umsitingin arbeiðir støðugt við einum bústaðarpolitikki fyri Fuglafjarðar kommunu. Arbeiðið fevnir millum annað um at gera lokalplanir fyri ymisk bústaðarøkir í kommununi. Útstykkingarætlanir skulu vera í trá við bústaðarpolitikkin hjá Fuglafjarðar kommunu.<br><br>**Útstykkingarplanur vesturi á Horn**<br>Tekniska deild hevur gjørt eitt uppskot til útstykkingarplan á økinum millu Gjógvará og vegin vestur á Horn.<br>Talan er um grundøkir til bústaðarbygging, har pláss er fyri tveimum grundøkjum omanfyri vegin, og 9 grundstykkjum niðanfyri vegin.<br>Fýra av grundøkjunum hava eina serskylda atkomu. Hetta gevur møguleika fyri tveimum grundstykkjarekkjum.<br>Tó er eitt alternativt uppskot gjørt, har 8 grundstykkir eru niðanfyri vegin.<br>Grundøkini eru áleið 400 til 500 m2.<br><br>**Serstøk byggisamtykt fyri økið og lokalplanur**<br>Neyðugt er at arbeiða við eini serstakari byggisamtykt fyri sama økið.<br>Økið er soleiðis hátta, at innari parturin av útstykkingini er egnað til eittplanshús, meðan tann eystari parturin av økinum er egnaður til sethús í tveimum hæddum.<br>Neyðugt verður eisini at taka atlit til útsýni hjá verandi grannaognum, og at útsýnisviðurskiftini hjá eigarum á nýggju útstykkingini verða so góð sum tilber.<br>Økið liggur tætt uppá Gjógvará, sum er sera náttúruvakurt, og júst hesi viðurskifti seta stór krøv til útstykkingina, bæði tá viðvíkur støðd og hædd av sethúsum, vegaføringum og estetikki.<br>Sum dømi kann nevnast, at markamótið millum grannar og oman ímóti ánni eigur at verða runnavøkstur ístaðin fyri garðar.<br>Tá avgerð er tikin um, hvussu økið skal skipast, verður farið undir at gera lokalplan og serstaka byggisamtykt fyri økið.<br><br>**Framhald 22. apríl 2021** |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Tekniska nevnd viðgjørdi málið á fundi 15. apríl í ár, har nevndin mælti til at arbeiða víðari við uppskotinum við 10 grundstykkjum og ein lokalplan fyri økið. Til kunning og umrøðu hjá býráðnum. | | |
| Bakgrund | Bústaðurpolitikkur hjá Fuglafjarðar kommunu og ynski um at gera fleiri útstykkingar til fjølbroytta bústaðarbygging. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Byggisamtyktin<br>BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00239-1 Tekniska deild_Uppskot til útstykkingarætlan | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir nevndini til at velja annað av fyriliggjani uppskotum, og at geva teknisku deild heimild til at arbeiða víðari við uppskotinum. | | |
| Dagf | 12. apríl 2021. | | |



**Tekniska nevnd 15. april 2021:**
Nevndin tekur undir við fyriliggjandi uppskoti við 10 grundstykkjum. Nevndin mælir eisini til at gera ein lokalplan fyri útstykkingina og gera eina kostnaðarmeting av at byggibúgva grundøkini íroknað planering og tekniska leiðingar. Vegaprosjektið verður ein verkætlan fyri seg.

**Býráðið 26. april 2021:**
Býráðið tók kunningina frá teknisku nevnd um fyrireiking av útstykkingarætlan vestur í Horn/Innandals til eftirtektar, og ynskti at arbeitt verður víðari við at fáa útstykkingarætlanina framda í verki.

## 15/21
## 21/00240-3 Meka_Nýggj el-innlegging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 15.04.2021 | 30/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 20/21 |
| 3 Býráðið | 26.04.2021 | 15/21 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisk nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Ein ástaðarlýsing og kanning av arbeiðsbygninginum Meka á vegadeildini vísir, at el-installatiónin er vánalig. Høvuðstalvan er ikki í lagi, og har installatiónin er ikki jørðað.<br>Trygdarumboðið hevur gjørt vart við, at umstøðurnar á Meka eru ov vánaligar, og at trygdin í sambandi við verandi el-installatión er ikki í lagi.<br>Formaðurin á vegadeildini hevur innheinta tvey tilboð frá tveimum veitarum, sum eru Elcon og JT-Electric. Tilboðini vóru hesi.<br><br>1. Elcon – Tilboð áljóðandi kr. 88.345,- u/mvg<br>2. JT electric – Tilboð áljóðandi kr. 85.640,- u/mvg<br><br>Tá tað er eitt lógarkrav, at el-veitingin skal vera í lagi fyri bygningar, so mátti umsitingin avgreiða málið skjótt, og bleiv arbeiðið sett í gongd beinanvegin, har avgjørt varð at biðja JT-Electric um at gera arbeiðið.<br><br>Sjálvt grevstrararbeiðið fyri nýggjari innføring og jørðkaðali ger vegadeildin sjálv.<br><br>**Fíggjarviðurskifti**<br>Tilboðið frá JT electric ljóðar uppá kr. 90.993,- v/6,25 % mvg. Grevstrararbeiðið verður mett til umleið kr. 10.000,-, sum verður fíggjað av rakstri. Samlala kostnaðarmetingin er mett til kr. 100.000,-.<br><br>Nevndin skal taka støðu til eina eykajáttan til arbeiðið.<br><br>**Framhald 20. apríl 2021**<br>Tekniska nevnd viðgjørdi málið tann 15. apríl í ár við tilmæli til fíggjarnevndina um at veita eykajáttan til at gera el-veitingina í Meka-bygninginum trygga og sambært galdandi lógarkrøvum. Hetta er eitt trygdarmál og neyðugt at gera, tí hetta er arbeiðsstaðið hjá vegadeildini. Ein møgulig eykajáttan verður fíggja av gjaldførinum hjá kommununi. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Framhald 22. apríl 2021**<br>Fíggjarnevndin samtykti í dag, at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd, og biðja býráðið um eina eykajáttan á 100 tús. kr. til at fíggja arbeiðið við nýggjari el-veiting í Meka bygningin. Umbøn um eykajáttan skal hava tvær viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili sambært kommunustýrislógini § 41, stk. 2. Ein møgulig eykajáttan verður fíggjað av gjaldførinum hjá kommununi. | | |
| Bakgrund | Dagføring av el-innleggingini, sum er eitt lógarkrav. | | |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Elveitingarlógin<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00240-1 Tilboð frá Elcon uppá el-arbeiðið áljóðandi kr. 88.345,- u/mvg<br>FK j. nr. 21/00240-2 Tilboð frá JT electric uppá el-arbeiðið áljóðandi kr. 85.640,- u/mvg | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Umsitingin mælir til at taka av tilboðnum frá JT electric á kr. 85.640,- u/mvg og biðja um eina eykajáttan til arbeiðið áljóðandi kr. 90.992,50. | | |
| Dagf | 12. apríl 2021. | | |



**<u>Tekniska nevnd 15. april 2021:</u>**
Nevndin samtykti at taka av tilboðnum frá JT electric, og at fíggja arbeiðið við eini eykajáttan, har málið verður lagt fyri fíggjarnevndina til støðutakan.

**<u>Fíggjarnevndin 22. april 2021:</u>**
Fíggjarnevndin samtykti, at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd, og fíggja arbeiðið við einari eykajáttan, sum býráðið má taka støðu til.

**<u>Býráðið 26. april 2021:</u>**
Býráðið samtykti einmælt (9-0) við 1. viðgerð, at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd og fíggjarnevndini, og fíggja arbeiðið við einari eykajáttan á 100 tús. kr.

16/21

## 21/00268-1 Fuglafjarðar bókasavn - Fíggjarætlan 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 26.04.2021 | 17/21 |
| 2 Býráðið | 26.04.2021 | 16/21 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | mentanarnevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing | Fíggjarætlan 2022 fyri Fuglafjarðar bókasavn til góðkenningar hjá Landsbókasavninum.<br>Nógv virksemi er á Fuglafjarðar bókasavni. Frá 1. jan 2020 til 1. januar 2021 hava 2.840 fólk vitjað, hetta hóast koronu.Bókasavnið er opið í 48 vikur og gevur tað eitt miðaltal á 59,2 vitjandi um vikuna.<br>Fyrsta kvartal í 2021 hava knapt 400 fólk vitjað Fuglafjarðar bókasavn.<br>Bókasavnið hevur til endamáls at fremja uppýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi og verða nógv ymisk tiltøk sett í verk fyri at náa hesum endamáli.<br>Lesiringurin er eitt afturvendandi tiltak, sum hevur staðið á skrá í fleiri ár. Lesiringurin hittist aðru hvørja viku og er væl umtóktur.<br>Umframt at hittast til bókaprát, høvdu vit eisini nøkur bókmenta og rithøvundatiltøk við upplestri og framløgum.<br>Eisini eru skriviskeiðini í samstarv við Fuglafjarðar kvøldskúla væl umtókt.<br>Bókasavnið speglar eisini tær verkætlanir sum verða skipaðar í mentanartoyminum.<br>Í febuar varð skipað fyri óhugnaligum bókasavni, har barnabókasavnið varð umbygt til eitt ræðsluhús við eiturkoppaspinni, eiturkoppum og øðrum óhugna. Undirtøkan var góð hesar dagarnar og vitjaðu 134 børn og barnsligar sálir bókasavnið.<br>Av øðrum tiltøkum, kunnu nevnast tær afturvendandi filmsýningar, sum hava fingið góða undirtøku millum børn og ung.<br>Umframt filmar til ymiskar aldursbólkar hevur Fuglafjarðar bókasavn eisini lagt seg eftir, at veita eina góða tænastu til ungar familjur og ansingarstovnar.<br>Skipað verður fyri ymiskum hugnaløtum, so sum jólaklipp og páskaklipp og eru ansingarstovnarnir glaðir fyri vaksandi samstarvið. Livandi jólakalendarin spjaðir nógvan hugna í |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | jólamánaðinum og mongu tiltøkini við klippum og øðrum síggjast aftur í bygdini og fløva um.<br>Leikluturin hjá Fuglafjarðar bókasavni er vaksandi í lokala samfelagnum og hugaligt er at koma inn á bókasavnið og møta ymisku brúkarunum. Teim lesandi ið hugdjúpa seg, afturvendandi eldru brúkarunum, ið nýta høvið at fáa eitt prát og ein kaffiduss og tí lívgandi ungdóminum og børnunum við teim mongu spurningunum. Samanumtikið hevur 2020 verið merkt av Koronu, men vit vóna og arbeiða fram ímóti at 2021 eydnast eins væl. | | |
| Bakgrund | Upprunin til málið | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **Bókasavnslógin**<br>• Møgulig fylgiskjøl **Fíggjarætlan og ársfrágreiðing** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Mælt verður til at taka undir við fíggjarætlanini fyri Fuglafjarðar bókasavn 2022, við tí endamáli at setaein útbúgvnan bókavørð. | | |
| Dagf | 26.04.2021 | | |



**Mentamálanevndin 26. april 2021:**
Mentanarnevndin tekur undir við fíggjarætlanini fyri Fuglafjarðar bókasavn 2022 og er málið at seta ein útbúgvnan bókavørð seinri í ár, at byrja í januar 2022.

**Býráðið 26. april 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá mentamálanevndini, og góðkenna fíggjarætlanina hjá Fuglafjarðar bókasavn fyri 2022.

Fundurin lokin kl. 20:10.

Gerðabókin lisin og góðkend.

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Magni Jøkladal

Ólavur Larsen

Gudny Vang

Eivin Breiðaskarð